HOYVÍKAR SKÚLI

Skúlastýrisfundur

Hósdagur 05. oktobur 2023 kl. 16.30 – 18.00

Á fundinum vóru: Rannvá Mortansdóttir, Laila Hentze, Gunnvør Balle, Kristianna W. Poulsen, Leivur Simonsen, Anna Maria Reinert

Avboð: Jógvan Páll Fjallsbak, Malan á Dul Nielsen

Fundarleiðari: Rannvá Mortansdóttir

Skrivari: Anna Maria Reinert Jensen

Skrá:

Vit byrjaðu við at presentera okkum.

1)Vetrarferian:

Stýrið viðgjørdi málið um vetrarferiu.

Ein tekur undir við vetrarferiuni. Hini eru hvørki fyri ella ímóti, halda ikki, at avgerðin er viðkomandi fyir tey.

2)Ferðsluátak:

Malan kannar hvussu nógv sett av veingjum skúlin eigur.

Skúlastýrið tekur ímóti næmingunum í veingjum við innkoyringina frá vegnum Langa og við Karlamagnusarbreyt. Tey geva næmingunum endurskin.

Átakið verður seinasta hósdag áðrenn vetrartíð - 26.okt

3)Tiltak saman við SvL:

Annita, forkvinnan har, nevndi, at tey vildu hava grooming á skrá. Ein, sum hevur verið fyri grooming, løgregla luttaka og pallborðsfund verður. (Bjarni K. Petersen er aktuellur, hann sigur, at lóggávan verður dagførd)

4)Foreldraumboðini skulu hava fund við foreldraumboðini í flokkunum:

Katrin finnur fram nøvnini.

5)Hølisviðurskifti:

Her manglar ein stova um 1,5 ár + at einki forskúlatilboða er her.

Dialogfundur verður við kommununa í nov. - tá verður málið eisini tikið upp.

6)Heim og skúli:

Fyribyrgjandi átak s.s.í Íslandi. Rannvá endurgav frá fundi hjá Felagnum heim og skúli, har greitt varð frá átaki í Íslandi, sum skal fyribyrgja, at børn og ung taka skeivar avgerðir og at tey fara á eina óheppna kós. Tað snúði seg fyri stóran part um, at foreldur og børn/ung eru meira saman, og at børn/ung ikki ganga og mala uttan uppsýn út á kvøldini. Eisini um at tey fáa ítrivstilboð.

7)Happing og trivnaður:

Trivnaðarætlanin - Stýrið vil hava trivnaðarætlanina hjá skúlanum at lesa.

Stýrið kundi eisini hugsað sær innlit í úrslitini fyri Hoyvíkar skúla av trivnaðarkanningina, sum gjørd varð í vetur/vár.

Fundur lokin kl. gott 18:00 - næsti skúlastýrisfundur 9. nov. kl. 16.30.